Nú eru hølini heit

Sunnudagin skal vera kjakfundur um meiningina við Ungdómsfelagnum



Klaksvíkar Ungdómsfelag heldur til í ovaru hædd í hesum bygninginum

Nú kunnu limirnir í Klaksvíkar Ungdómsfelag umsíðir sleppa inn í heit hølir. Tá arbeiðið hjá býráðnum at leggja hita inn í húsini hevur gingið ógvuliga striltið, kom felagsarbeiðið at verða merkt av einum deyðum aldudali eina tíð.

Ungdómurin hevur tó higartil megnað at røkt hølini, soleiðis at tað hevur verið opið at kalla hvønn dag, undantikið tá umvælt hevur verið. Slíkt sjálvboðið arbeiðið krevur nógva tíð og kreftir frá teimum einstøku limunum, vísa okkara royndir. Her hugsa vit einamest um tær vánaligu umstøðurnar, ið gera seg galdandi. T.d. stendur í leigusáttmálanum millum býráðið og K.U., at býráðið skal leggja vatn og hita inni hølini og er bert hitin eftir drúgva tíð innlagdur. Hvussu kann nakar halda eitt húsarhald við 150 limum í bitandi kulda við ongum vatni?

Fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá teimum virknu limunum, hava vit avgjørt at seta upplatingartiðirnar niður í tvey kvøld um vikuna: — hóskvøld og sunnukvøld frá kl. 18 til 23.

Hesi kvøldini fara at verða skipað við miðvísum og fjølbroyttum aktivitetum. Sunnukvøldið 13/2 verður latið upp kl. 18,00. Hetta kvøldið fara vit m.a. at halda ein tjakfund um meiningina við ungdómsfelagnum og týdningin av okkara ungdómsarbeiði og hvussu felagsarbeiðið eigur at skipast framyvir.

Hetta verður gjørt undir hugnaligum umstøðum við kaffi og køkum og byrjar kl. 20,00.

Sjálvandi fara nógvir limir at møta — og vit fara at royna at fáa eitt innihaldsríkt og hugnaligt kvøld saman, sigur Klaksvíkar Ungdómsfelag.

Útlit fyri at »skoyta« tá einki frost er

Um nøkur ár verður kanska møguligt at skoyta eisini tá frost ikki er.

Við átta atkvøðum fyri og fýra ímóti samtykti Tórshavnar býráð hóskvøldið eina minnilutatilráðing hjá Heðini Mortensen um at fyrireika mál um eina skoytubreyt ella skoytuhøll.

Samtyktin ber í sær, at stadionnevndin skal koma við ítøkiligum ætlanum um støddd, staðfesting av kostnaði og tíðarætlan fyri eina slíka bygging. Tá hesar fyrireikingar eru gjørdar, skal býráðið taka avgerð um skitsuprojektering, útbjóðing o.a.

Undir umrøðuni vísti Heðin Mortensen á, at vetrarítróttin hevur ikki góðar umstøður í Føroyum, og at børn tí skreiða á skoytum á koyrivegum.

Hann segði, at málið skal fyrireikast væl og at byggjast skal eftir tørvi. Hann upplýsti, at um niðurstøðan verður, at ein høll skal byggjast, so er møguleiki at hava annað virksemi í henni, við tað at gólv eisini kann leggjast í.

Leivur Johannesen segði, at tankin longu kom fram fyri 10 árum síðani, tá teknikkarar tilrættisløgdu ljósuppsetingina á gamla fótbóltsvøllin. Tá skeyt ein upp at gera eina skoytubreyt um hálvan vøllin. Men, segði Leivur, onnur arbeiði komu í staðin: tann nýggi vøllurin og svimjihøllin, so skoytubreytin fór í gloymskuna.

Hann segði seg ikki fara at ganga við til at eina stóra høll, men vildi ganga við til fyrireikingar og møguliga tilgerð av breyt ella høll.

Dánjal Larsen segði, at eins og hann hevði stuðlða Poul Michelsen í ætlanini at gera eina høll yvir gamla svimjihyl, stuðlaði hann Heðini Mortensen í hesi ætlanini. Hann segði, at meirilutin hugdi eftir umstøðunum í hinum Norðurlondunum, og vildi miðja ímóti at vera ájavnt grannalondini.

Ronald Poulsen helt tað vera jáfak at siga, at vit í hesi krepputíð skulu liggja a' j avnt við hini Norðurlondini ítróttarliga.

Møguleikin at gera eina uttandura skoytubreyt við frystiútbúnaðiog sum bert er opin kaldastu vetra rmaaðirnar skuldi ikki verið ein so dýr loysn.

Heðin Mortensen sigur við Sosialin, at hann einki hevur ímóti at gera eina uttandura skoytibreyt og hesin møguleikin skal eisini kannast. Hann upplýsir, at utta ndura breytir finnast t.d. í Íslandi.

jo- mo



Átta gerðisnøvn

Eftir uppskoti frá gøtunavnanevndini hevur Tórshavnar býráð samtykt, at gøturnar úti á Fløtum skulu eita: Flatnagerði, Øksnagerði, Purkugerði, Kálvagerði, Lambagerði, Folagerði, Stóragerði og Smiðjugerði. Úti á Fløtum eru sethús so smátt við at koma upp.

Nú kann Velbastaðvegurin breiðkast

Eftir tímalangan orðadrátt hevur Tórshavnar býráð einmælt samtykt at taka 500.000 kr. í bankaláni frá Føroya Banka til at breiðka Velbastaðvegin í hesum figgjarárinum.

Arbeiðið er mett at kosta 3,2 mill. kr. og ætlanin er, at kommunan sjálvt skal gera arbeiðið.

Orðaskiftið snúði seg m.a. um, at eftir at býráðslimirnir Jákup S. Jacobsen og Petur í Gong hava tosað við eigararnar við Velbastaðvegin um at lata lendi, hevur býráðsformaðurin, Poul Michelsen, kalla teir til fund, uttan at hava boðað hinum frá.

Undir hesum málinum kom fram, at projekt-konto'in er yvirtrekt við 700.000 kr., tí eingi lán, sum sambært figgjarætlanini skuldu takast fyri 15 mill. kr., eru tikin.

Bil hevur vaksandi hall av bussleiðini

Ársrokniskapurin hjá P.f. Bil fyri bussleiðina seinasta ár fer væntandi at vísa um 370.000 kr. í halli. Hetta er væl meira enn í 1981, tá hallið við rentum og avskrivingum var 224.000 kr.

Tí samtykti eitt samt býráð hóskvøldið at játta P.f. Bil 200.000 kr. av reguleringskonto'ini (ein tiltakskonto hjá Tórshavnar býráð).

Tann endaligi rakstrarroknskapurin fyri árið í fjør fyriliggur ikki enn, men teir fyrstu nýggju mánaðirnir góvu 270.000 kr. í halli.

Ætlanin var at fáa ein endaligan sáttmála við P.f. Bil frá 1.4. 1982, men ógreiðir spurningar um tað, roknskapartølini vístu, gjørdi, at málið ikki fekk eina loysn.

Perlan skal tekjast

Perlan verður ikki rivin niður í hesum umfari. Hon skal hava nýggja tekju. Tað samtyktu sjey býráðslimir hóskvøldið. Fýra vóru ímóti.

Í fundarfrásøgnunum frá teimum ymisku nevndunum og í tilráðingunum verður einki nevnt um kostnaðin av arbeiðinum. Men samtyktin sigur, at 50.000 kr. skulu takast av eini konto, sum er ætlað til frítíðarvirksemi.

Í Perluni húsast Javnar Jazzfelag.

Javnaðarkvinnur møtast nú í Vági

Um fjúrtan dagar hittast javnaðarkvinnur aftur. Hesuferð suðuri í Vági. Vikuskiftið 26. og 27. februar skipa javnaðarkvinnur í Suðri og tey trý javnaðarfeløgini í oynni fyri fundum fyri øllum javnaðarkvinnum í Føroyum.

Hetta varð viðtikið á kvinnufundinum í Havn tann 20. november í fjør, tá tann fyrsti javnaðarkvinnufundurin varð hildin.

Evnini, fundurin í Vági eftir ætlan skal arbeiða við, eru arbeiðaraviðurskifti og almannalóggávan. Grundarlagið verður virkisskrá floksins.

hølunum. Hann byrjar leygarkvøldið 26., eftir at Smyril er komin suður.

Tær, sum ætla at luttaka á fundinum, skulu boða frá frammanundan. Skipað verður fyri innivisti hjá privatfólki í Vági. Seinasta freist at boða frá luttøku er friggjakvøldið 18. februar.

Og tað kann gerast við at ringja til annaðhvørt: Elsebeth Nielsen, tlf. 73405, Ellen Vogensen, tlf. 73030, Ingeborg Vinther, tlf. 73427, ella til Elina Jacobsen, tlf. 73054.

Fundurin er fyri javnaðarkvinnur, sum eru limir í flokkinum. Men ráð eru fyri tí, um onkur, sum er limur — tað ber til at melda seg inn í javnaðarfelagið á staðnum — líka mikið um tað er í Norðstreymoy, Sandoynni, Vágum ella aðrastaðir.

— Í tí treysti, at fundurin í Havn var byrjanin til eitt mennandi kvinnupolitiskt arbeiði framyvir — bæði innan Javnaðarflokkin og tvørpolitiskt — bjóða vit øllum javnaðarkvinnum vælkomnum til fundin í Vági, siga tær fýra Ellen, Elin, Elsebeth og Ingeborg, úr Vágs Javnaðarfelag.

jo-mo



